Lesið eisini
ítróttin
á alnetinum:
www.sosialurin.fo

Telist millum heimsins bestu

38 ára gamla Lone Hansen, sum seinasta vikuskifti var í Føroyum, har hon vitja›i Havnar karate-felag, er ikki nakar ársungi í ítróttarhøpi. Í nógv ár hevur hon veri › millum fremstu í›kararnar í Danmark og í heiminum. Harumframt kann hon eisini nevna seg professara í mannakroppinum. ÍtróttaSosialurin hevur hitt karate meistaran og lærling hennara


Mynd: Álvur Haraldsen

- Sjálvandi duga vit rættuliga væl at berjast, men vit duga eisini væl at lata vera vi› at berjast, sigur Lone millum anna› um karate ítróttina

Jákup Mørk

Ta› var ikki hissini vitjan, sum Havnar Karate felag hev›i um vikuskifti›. Sum nevnt í fríggjadagsbla›num, so hev›i felagi› vitjan av tveimum dønum, sum eru komin rættuliga langt í hesi ítróttargrein.

Leygardagin vóru vit í HB húsinum, har venjingin fór fram, har vit hittu tey bæ›i, Lone Hansen og Michael Catalan, beint eftir at tey í einar tveir tímar høvdu m‡kt vøddarnar hjá føroysku í›karunum.

Karate meistari og professari

Longu á›renn eg hev›i hitt tey bæ›i, hev›i eg fingi› varhugan av, at talan her var um tvey ítróttarfólk, sum vóru rættuliga frammaliga í sínum yrki.

Lone Hansen er níggjufaldur danmarksmeistari, me›an Michael Catalan higartil »bert« kann erpa sær av f‡ra slíkum heitum í vaksnamannahøpi. Ver›a hei›ursmerkini frá yngru deildunum lød afturat, røkkur hann tó somulei›is teimum níggju heitunum.

Lone, sum í dag er 38 ár, hevur har umframt hei›urin av at vera tann kvinnan í heiminum, sum hevur hægstu gradina (sætta dan) í karate, og virkar í dag sum landsli›svenjari hjá donsku karate kvinnnunum.

Vi› sí›una av øllum hesum hevur hon eisini megna at fingi› sær heiti› sum profesari í humaniterari fysiologi, t.e. vi›víkjandi mannakroppinum, sum einki er at ivast í, at karatekvinnan er naka› fyri seg.

Meistari og lærlingar

Tá vit spurdu hana, hvussu hon hev›i megna› alt hetta svara›i hon, at hon so at siga bara hev›i roynt at gjørt sítt besta alla tí›ina. Á›renn hon fór undir at ví›ari lesna›in, hev›i hon tiki› útbúgving sum ítróttarlærari, og tískil kundi hon forvinna sær naka› av peningi vi› at undirvísa, umframt at hon so eisini var karate lærari vi› sí›una av.

At alt hetta hevur tiki› nógva tí›, er líti› at ivast í. Venjingartímarnir hava veri› nógvir í tali, sí›ani hon sum 13 ára gomul byrja›i venjingina. Til stuttleikar kann nevnast, at tá hon var› spurd um hevur vant alla tí›ina sí›ani tá, svara›i hon, ja, burtursæ› frá einari viku - tá eg átti.

Michal Catalan er ta›, tey nevna lærlingur hjá Lone. Ta› ljó›a kanska eitt sindur løgi› at nevna ein ferfaldan danmarksmeistara fyri lærling, men hetta merkir, at tá hann ver›ur undirvístur av Lone, er ta› bert honum hon undirvísur.

Sjálvur er Michael sera fegin um henda møguleikan, og eisini er hann sera stoltur um, at hann er komin somiki› langt í ítrótt sínari. Einki er at siga til, at hetta er eitt stórt privelegium hjá honum, tí munur er á, hvussu nógv tú læru, um lærarin bert hevur teg at hugsa um, ella um ta› eru eini 10-15 næmingar, sum samstundis fáa undirvísing.

Ta› hevur tó sjálvsagt eisini kravt sítt, at Michael er komin somiki› langt. Hvørja viku er hann undir lei›slu av Lone í einar 20 tímar, og vi› sí›una av hesum lesur hann á universitetinum, umframt at hann eisini hevur egnan karate skúla.

Ung ítrótt

Millum manna er vanliga fatanin ofta, at karate ítróttin er ein elligomul ítrótt, sum japanesarar í mong hundra› ár hava í›ka›.

So er kortini ikki, tí Lone grei›ur frá, at henda sermerkta ítróttargrein ikki tók seg upp fyri enn umlei› 1920.

Hetta tók seg upp sum li›ur í venjingini av japanesiskum hermonnum, sum á henda hátt eisini lærdu at berjast uttan at gera n‡tslu av vápnum.

So vi› og vi› gjørdist ítróttin meira kend, og eins og so nógv anna›, so hevur hon eisini tillaga› seg til tær broytingar, sum altí› vilja vera í øllum samfeløgum.

Í fimtitalinum hev›i ítróttin eisini rokki› Danmark, men at byrja vi› vóru ta› ikki serliga nógvir í›karar.

Hetta broyttist tó í sjeytitalinum, og var ta› serliga mongu karatefilmarnir vi› millum ø›rum Bruce Lee, sum gjørdu sítt til, at ta› brádliga vóru sera nógv ungfólk, sum s‡ndu áhuga í hesum.

Í dag er karate tann strí›sítróttin (kampsport), sum hevur størstu undirtøkuna millum danir, og eru umlei› 8.500 skrásettir í›karar í Danmark í dag.

Ikki har›skapur

Ikki fyrr enn í 1990 er henda ítróttargrein komin til Føroya, so enn eru vit sjálvandi ikki komin eins langt og danir vi› hesum. Lone grei›ur tó frá, at hon hev›i ikki vænta›, at stø›i› var so høgt í Føroyum, sum ta› veruliga er.

Ikki tí, lærarin her í Føroyum, 24 ára gamli Tonny Brimsvík, hevur í eini 10 ár vant karate. Hann byrja›i, tá ítróttin tók seg upp her á landi, men sí›ani hevur hann eisini búleikast í Danmark, og helt hann alla tí›ina á vi› venjingini.

Frægasta úrslit hansara er, tá hann ta einu fer›ina megna›i at vinna sær eitt fjór›a/fimta pláss í DM, so førleiki hansara at undirvísa skuldi helst veri› á einari lei›.

Eisini fegna›ist hon um, at ta› vóru somiki› nógv ungfólk, sum vóru til venjingarnar, tí ofta er ta› ein trupulleiki, at foreldrini ikki vilja, at børn teirra skulu læra at sparka og sláa.

Hon leg›i tó dent á, at hesin ótti frá foreldranna sí›u er fullkomuliga ógrunda›ur. Stórur partur av karate venjingini er nevnliga eisini grunda›ur á, at í›kararnir skulu læra at st‡ra sinnalagnum, solei›is at eingin bardagi tekur seg upp, fyrr enn ta› er alney›ugt at verja seg.

Serliga í byrjanini ver›ur stórur dentur lagdur á hetta, og sum hon sigur, so skalt tú vinna tær rættin til at móttaka frálæruna í ítróttini.

Um so er, at ein næmingur kanska hevur lyndi at gerast har›ligur, ver›ur vi›komandi burturvístur frá venjingini, og hetta hevur so eisini vi›ført, at allir í›kararnir veruliga hava vir›ing fyri ítróttini.

Hetta kom eisini til sjóndar, tá vit hugdu at venjingini, tí hvør tann einasti næmingurin, sum var til sta›ar, bukka›i og takka›i, tá fari› var› úr venjingarhølunum.

Av tí sama er karate ein av teimum fáu strí›sítróttunum, sum er sloppin undan at standa á forsí›unum í t.d. Ekstra-bladet, av tí at onkur í›kari hevur gjørt um seg á dansista›i› ella líknandi. Hetta er fleiri fer›ir komi› fyri í fleiri ítróttargreinum, og Lone er sera fegin og errin av, at hetta ikki er hent teimum.

-Sjálvandi duga vit rættuliga væl at berjast, men vit duga eisini sera væl at lata vera vi› at berjast, sigur Lone um orsøkina til, at tey eru sloppin undan hesum gølum.

Vert er kanska at leggja afturat, at júst hetta vi› sinniligari venjing kanska er tann mest gevandi parturin av karate. Michael helt í øllum førum, at ítróttin hevur veri› honum ein stór hjálp í nógvum lutum í gerandisdegnum. Serliga tí tú lærir at hava bindindi til ta›, sum tú fæst vi›.

Koma kanska aftur

Sunnudagin fóru tey bæ›i so av aftur landinum, men stendur ta› til teirra, so er hetta ikki seinasta fer›in, at tey leggja lei›ina henda vegin.

Bæ›i eru tey sera hugtikin av føroyska landslagnum, og tey s‡ndust nærum vera kedd av, at tey ikki í størri mun høvdu fingi› høvi at vitja› ymsu oyggjarnar.

Tonny Brimsvík leggur eisini afturat, at tey bæ›i skulu ver›a so hjartaliga væl komin aftur, tí eftir hansara tykki hevur karate felagi› fingi› alstóra nyttu úr vitjanini.

Hetta er so avgjørt vi› til at hækka stø›i hjá okkum, og tey bæ›i hava so øgiliga nógv meira at læra frá sær enn bert ta›, sum stundir vóru til hesu fer›.

Lone Hansen
Aldur: 38 r
Yrki: Professari humaniterari fysiologi, L rari karate, Landsli svenjari karate
Vant s ani: 1975
Tignarstig: 6. dan
rslit: N ggju DM-heiti, nr. 10 HM, nr. 6 EM, 11 r danska landsli num

Michael Catalan
Aldur: 23 r
Yrki: Lesandi universiteti L rari karate
Vant s ani: 1986
Tignarstig: 3. dan
rslit: N ggju DM-heiti (harav 4 sum senior), nr. 3 HM fyri juniorar, nr. 3 EM fyri juniorar (stilart), nr. 9 EM, 8 r danska landsli num


Mynd: Álvur Haraldsen

Ferfaldi danmarksmeistarin, Michael Catalan, dugdi so sanniliga eisini sína ting, hóast hann á pappírinum bert er lærlingur hjá Lone

Formansval og lógarbroytingar

Komandi leygardag hevur Fótbóltssamband Føroya árliga a›alfundin. Millum málini á skránni hesufer› eru m.a. val av formanni og nevndarlimum, umframt at ætla›ar broytingar í kappingarreglunum ver›a framlagdar

Jákup Mørk

Komandi leygardag ver›ur regluligi ársa›alfundurin hjá Fótbóltssambandi Føroya hildin. Feløgini hava fyri kortum fingi› tilsent fundarskrá hesum vi›víkjandi, og á skránni er val av formanni og nevndarlimum, umframt at a›alfundurin skal taka stø›u til nøkur uppskot um lógarbroytingar fyri fótbóltsvirksemi› her á landi.

Nevndarlimirnir, sum hesu fer› standa fyri vali, eru Torleif Sigur›sson, forma›ur, Dánjal Andreasen, Jákup Simonsen og Karl Vidtfeldt.

Yvirlit yvir tær broytingar, sum ver›a lagdar fyri a›alfundin var› í farnu viku sent fótbóltsfeløgunum, og skulu vit í stuttum grei›a frá ætla›ur broytingunum.

Ætla›u broytingarnar eru ikki á nakran hátt ókendar av feløgunum, tí seinastu árini hevur ta› veri› fastur si›ur, at umbo› fyri feløgini hava hitst í november mána›i, har tosa› ver›ur um ymisk vi›urskifti. Út frá hesum fundum, tekur nevndin í FSF so stø›u til, hvørji vi›urskifti› møguliga eiga at ver›a broytt. Sum skilst eru flestu feløgini sera fegin um henda møguleika, tí tey á henda hátt kunnu »lufta« ymsum hugskotum á›renn a›alfundin.

Einsrætta›ar reglur

Ein hin t‡dningarmesta broytingin er, at freistin fyri at fáa n‡ggjar leikarar skrásettar hjá einum felag, ætlandi skal setast at vera 28. juli í kappingarárinum.

Ætlandi skal henda regla ver›a galdandi fyri allar leikarar, útlendingar sum føroyingar, og ver›ur avlei›ingin av hesum, at somu reglur vera galdandi fyri allar leikarar.

Á›ur hevur ta› jú veri› solei›is, at reglurnar fyri at fáa leikarar kn‡ttar at feløgunum hava veri› ymiskar, alt eftir um talan var um føroyskan ella útlendskan leikara. Besta dømi um hetta var helst, tá KÍ seinasta kappingarár kn‡tti Jan Allan Müller at felagnum. Ta› fer›ina var hetta einasti møguleiki felagsins, vi› ta› at evstamark fyri at fáa útlendskan leikara til felag›i var› fari› aftur um bak, me›an ta› framhaldandi var loyvt at kn‡ta føroyskan leikara, sum var búsitandi uttanlands, at felagnum

Var ta› ikki fyri hetta hol í fótbóltslógini, hev›i KÍ helst veri› í ringum skørum, orsaka› av søluni, og ta› kann ikki vera rætt, at felag skal ver›a revsa›, tí teir megna› at uppalt ein leikara, sum er nóg gó›ur til at fara uttanlands at royna seg.

At evstamarki› er sett til 28. juli merkir eisini, at feløgini hava longri skotbrá, tá útlendskir leikarar skulu keypast, og tískil helst eisini hava møguleika at kanna máli› nærri, á›renn sáttmáli ver›ur skriva›ur vi› útlendskan leikara.

Í B36 er lei›slan helst sera fegin um hesa reglu, tí flestu fótbóltsáhuga› munnu minnast, hvussu gekst seinasta ár, tá teir í skundi máttu leita sær út um landoddarnar eftir málmanni. Vanligi málma›ur felagsins, Egin Høgnesen, var skaddur, uttan at nakar visti hvussu leingi hetta vardi, og tískil kundi ta› veri›, at felagi› fekk tørv á ø›rum málverja. Evstamark fyri at flyta inn útlendska arbei›smegi var tá 1. mei, og í skundi var› ein ungverskur málverji tikin heim, uttan at felagi› hev›i havt nóg gó›ar stundir at eftirkanna dygdirnar hjá hesum

Hetta merktist eisini í teimum landskappingardystum, sum ungarin leikti, og ikki gekk long tí›, á›renn avger› var› tikin um, at hetta ikki var ein haldgó› loysn.

A›rar broytingar

Nakrar a›rar broytingar eru eisini á skránni. Sum nevnt fyrr í bla›num, er ætlanin framyvir, at dómarabólkurin skal fáa sams‡ning sína á›renn dystarbyrjan, og ikki eftir dystin, sum ta› hevur veri› gjørt higartil.

Eisini er ætlanin at broyta reglurnar fyri, hvussu farast skal fram, tá tvey li› standa jøvn á stigatalvuni, solei›is at grei›ar reglur eru á hesum øki. Serliga er henda broytingin ætla yngru deildunum, har ta› fleiri fer› er komi› fyri, at oddali›ini hava kappast um skoti› flest mál móti veikaru li›unum. N‡tt vi› hesi skipan er, at nú eru ta› innanh‡sis dystirnir, sum hava størst vekt, og bert um ta› stendur á jøvnum hesum vi›víkjandi, ver›ur ta› málmunurin, sum ver›ur n‡ttur. Ikki hava serliga nógv trætumál veri› hesum vi›víkjandi í vaksnamannadeildini, men summi munnu kortini minnast ru›ulleikan fyri einum 20 árum sí›ani, tá ta› stó› á jøvnum millum LÍF og MB, tá vinnarin av a›ru deild skuldi finnast.

Seinasta broytingaruppskoti› vi›víkur n‡tslu av leikarum. Har hevur ta› fyrr veri› solei›is, at allir leikarar hava veri› undirlagdir regluni um, at leikari bert kann leika ein dyst hvønn leikdag. Hetta er nú broytt, solei›is at málverjar, sum leika í lægri vaksnamannadeild, nú kunnu ver›a eykamálverjar sama leikdag. Talan er sostatt um eina lítla liberalisering, sum helst vil vi›føra, at útskiftisbenkurnir í fyrstu deild framyvir ver›a betri manna›ir, hvat málverjum vi›víkur.

Hvørt felag kann í mesta lagi senda tr‡ umbo› á a›alfundin, og hevur hvørt felag eina atkvø›u í part. Treytirnar fyri atkvø›urætti eru, at felag skal hava fíggjarvi›urskiftini vi› FSF í lagi, eins og felagi› skal hava luttiki› vi› minst einum li›i› í undanfarna kappingarári›.